# Tímalønir til frítíðarundirvísing skúlaárið 2018/19

***ALMENN FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING:*** Tímalønin er **272,00 kr**.

***FRÍTÍÐARVIRKSEMI:*** Tímalønin er **235,00 kr**.

***SERSTØK FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING -*** Serundirvísing: Tímalønin hjá lærarum, ið hava **serliga útbúgving** at taka sær av ávísum breki, er **326,00 kr**.

***LEIÐARALØN:*** Leiðaralønin er almenn frítíðarundirvísing 272 kr.*10% = **27,20 kr.**

Studningur verður veittur til lønarútreiðslurnar, og verður hann goldin soleiðis til hvørt høvuðsøki:

- ***Almenn frítíðarundirvísing***: 50% av studningsheimilaðu útreiðslunum
- ***Frítíðarvirksemi:*** mesta lagi 50% av studningsheimilaðu útreiðslunum
- ***Serstøk frítíðarundirvísing:*** 100 % av studningsheimilaðu útreiðslunum.

Fyri at tryggja, at íbúgvarnir í kommunum fáa eitt fjølbroytt tilboð, fer Mentamálaráðið at mæla til, at eini 60% av játtanini verða brúkt til almenna frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi og restin til serstaka frítíðarundirvísing. Tað er tó kommunan, sum tekur endaliga avgerð um hetta býtið.

## Tímakostnaður

**ALMENN FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING:**

- Íroknað frítíðarløn, leiðaraløn og lógarfest gjøld, kostar hvør tímin 349,55 kr.
- Landskassastudningur er 50%. Tímatalið = studningur / 175

**FRÍTÍÐARVIRKSEMI:**

- Íroknað frítíðarløn, leiðaraløn og lógarfest gjøld, kostar hvør tímin 306,32 kr.
- Landskassastudningur er 50%. Tímatalið = studningur / 153

**SERSTØK FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING:**

Serundirvísing:

- Íroknað frítíðarløn, leiðaraløn og lógarfest gjøld, kostar hvør tímin 412,63 kr.
- Landskassastudningur er 100%. Tímatalið = studningur / 413,00

Fráfaringarroynd fólkaskúlans:

- Sáttmálasett løn millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag hækkað við 20%
- Landskassastudningur er 100%.

HF-undirvísing:

- Sáttmálasett løn millum Fíggjarmálaráðið og Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara hækkað við 20%.
- Landskassastudningur er 100%.

Yrkiskend undirvísing og onnur royndarfyrireikandi undirvísing:

- Sáttmálasett løn millum viðkomandi yrkisfelag og arbeiðsgevara hækkað við 20%
- Landskassastudningur er 100%.